

**BROYTING**

*– Klaksvíkingar, sum búgva uttanlands, koma ikki longur heim til Norðoyastevnuna. Nú skulu tey fyrst og fremst verða við á festivalinum, sigur Jógvan Ósa*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# FESTIVALURIN hevur vunnið á stevnuni

**Klaksvíkingar, sum búgva uttanlands, koma ikki longur heim til Norðoyastevnuna. Nú er tað Summarfestivalurin, sum verður raðfestur hægst**

Uni Holm Johannesen

Jógvan Ósa styðjar til við at hava báðar hendurnar á borðinum, hellur seg eitt sindur framav og greiður sannførdur frá. Klaksvíkingurin hevur fylgt gongdini, síðan Summarfestivalurin sá dagsins ljós í 2004. Og niðurstøðan er løtt og einføld. Summarfestivalurin er farin í leiklutin, sum Norðoyastevnan hevur røkt seinastu mongu áratíggjuni.

Norðoyastevnan hevur altíð verið stevnan, har norðoyingar savnast. Men Jógvan Ósa vísir á, at klaksvíkingar savnast ikki um Norðoyastevnuna sum fyrr. Festivalurin í Klaksvík verður raðfestur hægst.

– Klaksvíkingar, sum búgva uttanlands, koma ikki longur heim til Norðoyastevnuna. Nú skulu tey fyrst og fremst verða við á festivalinum. Soleiðis hevur rákið verið seinastu árini, sigur Jógvan Ósa aftaná, at hann hevur víst okkum runt á Norðoya Fornminnisavni, har hann starvast.

## Ikki avtaka stevnuna

Klaksvíkar Kommuna royndi at seta snúður í lokalu stevnuna í ár fyri at lokka føroyingar til býin. Dagarnir fingu heitið »Norðoyastevnan 2010 fyri børn og barnsligar sálir«, sum skuldi bera brá av nýhugsan og lógvataki millum bygdir og bý í Norðoyggjum. Tað eydnaðist fyri so vítt. Men meðan Summarfestivalurin væntar gott og væl 10.000 gestir í ár, fær Norðoyastevnan ikki í námd sama tal av vitjandi.

Jógvan Ósa væntar hinvegin ikki, at festivalurin verður við til at gera av við stevnuna. Býurin noyðist at hava ein annan møguleika enn tónleikafestivalin.

– Tú kann ikki bara siga, at stevnan skal takka fyri seg, tí hon hevur tapt kappingina seinastu árini. Vit noyðast at halda fast um summar gamlar siðvenjur. Tað er umráðandi at standa saman um tað serføroyska, og ikki lata tað fíggjarliga fáa fastartøkur á okkum. Tað er heldur ikki til at siga, hvussu verður við tónleikafestivalum um nøkur ár. Men tú veit, hvat tú kann vænta av stevnuni, sigur Jógvan Ósa.

## Kappróðurin

Á fyrstu summarstevnuni fáa mongu kappróðrarfólkini seg loksins roynd. Norðoyastevnan er startskotið til drúgvu føroyameistarakappingina hjá kappróðrarfólkinum, sum stríðast og strevast við venjingini í fleiri mánaðir.

Og júst kappróðurin er sera týdningarmikil, um Norðoyastevnan skal áhaldandi draga andan, metir Jógvan Ósa.

– Kappróðurin hevur altíð savnað eina rúgvu av fólki, og hann er grundarlagið undir stevnunum. Stevnurnar fara altíð at liva í kappróðrinum, sigur Jógvan Ósa, áðrenn vit verða noyddir at takka fyri okkum, tí hann fær vitjan av donskum gestum, sum fegin vilja verða víst runt á Fornminnissavninum.

*uni@sosialurin.fo*